# lívdin

- í lívd hins hægsta

januar 2009





# Gott nýggjár

*Lívdin ynskir øllum eitt*
*av Harranum signað nýggjár*
*og takkar fyri tað farna*

## Tað sum er umráðandi

Bókin “The Tyranny of the Urgent” hevur ein hjartanemandi boðskap: Lat ikki tað, sum hastar, taka yvir tað, sum er umráðandi.” Tað, sum hastar, klórar, berjist og skríggjar eftir tínum áhuga, orku og tíð. Tað, sum hastar, setur stór krøv og fær teg at halda, at tú gert nakað gott við at góðtaka krøvini, sum tað setur. Men sorgarleikurin er hesin: Táið tú livir fyri tað, sum hastar (mangan smáting), so liggur tað, sum er umráðandi, á láni. Og tað, sum er so grípandi, er, at tað, sum er umráðandi, larmar ikki og setur heldur ikki nøkur stór krøv. Ólíkt tí, sum hastar, so bíðar tað, sum er umráðandi, stillisliga og tolið eftir, at vit fara at sanna, hvønn týdning tað hevur. Men í okkara støðuga stríði av tí, sum hastar, koma vit ongantíð til tað, sum er umráðandi í lívi okkara, og tessvegna missa vit alt og sita eftir tómhent. Jesus segði: “Nei, søkið fyrst ríki Guds og rættvísi Hansara! So skal alt hetta verða givið tykkum umframt!” (Matt. 6:33). Mátti Harrin hjálpt okkum at liva fyri tað, sum er umráðandi, í 2009 og bíða við tí, sum hastar.



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Myndir frá jólunum

Sunnudagarnar 21. og 28. desember var einans eitt møti í Hoyvíkar skúla. Har varð skipað fyri ymiskum, sum t.d. sang- og tónleikaframførslum, og prát við útisetar.



*Sirikit Jacobsen syngur*
*Sangframførsla*
*Prát við útisetar*
*Janus og Olga framføra*
*Drifa Hansen syngur*
*Prát við útisetar*
*Børn sýna fram*
*Linda Andrews*
*Lucia gongd*

*Myndir: Tórvør Vang*

## Lívdin til Zarepta




Vikuskiftið 13.-15. mars 2009 skipar Lívdin fyri samkomulegu á Zarepta. Enn eru ongar veruligar fyrireikingar gjørdar til leguna, men vit gera longu vart við leguna nú, so fólk kunnu seta merki í álmanakkan.

## Lívsdropar byrja aftur

Mánadagin 5. januar 2009 kl. 17.00 byrja Lívsdroparnir aftur í hølunum á Brekku.

## Gloymdir lutir

Tá vit rigga av eftir møtini sunnudag, kemur tað javnan fyri, at ymsir lutir liggja eftir. Tað kann vera klædnapløgg bæði hjá børnum og vaksnum, prýðislutir, bíbliur o.a.

Higartil hava vit ikki havt nakað fast pláss til hesar lutir, men nú hava vit fingið okkum ein væl avmerktan plastikkassa, sum plagar at standa við borðið í gongini, har slíkir lutir skulu leggjast í.

Tey, sum finna gloymdar lutir, verða biðin um at leggja teir í kassan, og tey, sum hava mist okkurt, kunnu leita í kassanum.

## Innsavnan av leikum og klæðum



*Bo Wallenberg, leiðari á Skandinavisk Barnemission, talar í Lívdini*

Skandinaviska Barnamissiónin savnar inn leikur, klæðir og teppir til fólk í Ukraina, sum hava brúk fyri tí. Skandinaviska Barnamissiónin hjálpir eisini fólki í Føroyum, tí tað eru ikki øll, ið hava so nógv. Tí kann tað gott vera, at tað, tey geva, møguliga eisini verður latið til onkran í Føroyum.

Tað, sum hevur áhuga, er t.d. leikur, rein heil klæðir, teppir og seingjarklæðir, tógv og toy (meturvørur), frímerkir og reinir og heilir skógvar.

Lutir kunnu latast inn í Evensens Pakkhúsi í Gongini í Havn eftir avtalu. Ringjast kann til Ellu Niclasen á tlf. 21 34 07 ella 31 62 68. Eyðgerð Dahl í Tjarnarlág 31 tekur eisini ímóti lutum og klæðum. Hon hevur tlf. 313832 og 513832.

## Tillukku við barninum



Tann 21. november 2008 fingu Annbritt og Alex Jacobsen í Hoyvík eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3.790 gr.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

6. jan. Bønarløta
13. jan. Húsbólkar
20. jan. Trúboðaraverkið í Teilandi (Sørin Joensen)
27. jan. Hvat lærdu vit av talunum sunnudagin

## Mammubólkur á Brekku

Annanhvønn fríggjadag kl. 10.30 savnast mammubólkur í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík. Mammubólkurin savnast fríggjadag í líka viku, t.v.s. viku 42, 44, 46 o.s.fr. Allar mammur við smáum børnum eru vælkomnar.

Er okkurt at spyrja um, eru tit vælkomnar at ringja til Súsonnu Joensen á tel. 319899.

## Bønarløtur á Brekku

Skipað verður fyri bønarløtum í hølunum á Brekku hvønn mánadag kl. 08.10, hvønn týsdag kl. 16.10 og hvønn fríggjadag kl. 12.10. Haraftrat er ein bønarløta hvønn sunnumorgun kl. 10.10 í Hoyvíkar skúla.

Á bønarløtunum á Brekku verður umframt at biðja eisini gingið gjøgnum bønirnar í Sálmunum. Tað eru Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen, sum skipa fyri.

## Innsavning til Bíbliur




Á kunningarborðinum í Lívdini stendur ein krukka, sum fólk hevur høvi at lata pening í til prenting av Bíblium í Kina. Kostnaður fyri prent og útbreiðslu av einari Bíbliu í Kina er 20 kr.

Eisini ber til at stuðla tiltakinum við at flyta pening á kontu í Eik banka: 9181 128.239.7, viðmerkt: Bíbliur til Kina.

Tann størsta vekingin í samkomusøguni er í dag í Kina. Tað ger, at tørvurin á Bíblium er ovurhonds stórur. Málið er at útvega Kina 100.000 Bíbliur frá føroyingum í 2008. Ábyrgd av tiltakinum hava Jógvan Zachariassen og Jeffri Johannesen.

## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 4. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Nýggjár – nýggir møguleikar*
*Talari: Guttorm Joensen*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Útlit*
*Talari: Johan Syderbø*

### Sunnudagin 11. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Bøn*
*Talari: Poul Guttesen*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Opið evni*
*Talari: Jens Wang*

### Sunnudagin 18. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Vitnisburðir / opið evni*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: "Ljómi dýrdar Hansara"*
*Talari: Ólavur Jøkladal*

### Sunnudagin 25. januar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Kvinnur í Bíbliuni - Ester*
*Talari: Ilda Lómstein*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Opið evni*
*Talari: Poul Guttesen*



















** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*